


**Nr. 13** *23. juni 2024* **84. árg.**

# Hav frímóð

Bíblian biður okkum um ikki at blaka burtur okkara treysti, okkara frímóð, tí tað ber stóra løn í sær. (Hebr. 10,35). Jósva varð biðin um at vera reystur og hugdjarvur. (Jós. 1,6). Tí skulu vit vera áhaldandi og sterk í bønini, tí svarið kemur.

Nú eitt kvøldið sóu vit á Kanal 10 í sjónvarpinum eina samrøðu við evangelistin Kjell Halltorp. Hann hevur virkað nógv niðri í miðeystri, og hann greiddi frá, at hann hevði prædikað fyri jødum, og tað kvøldið blivu 500 jødar frelstir. Skriftin greiðir okkum frá, at eitt skýli skal liggja yvir eygunum á jødum, líka til heidningarnir eru komnir inn allir sum ein, og so skal alt Ísrael blíva frelst. (Róm. 11,25–36). Hetta sigur okkum, at afturkoma Jesusar er ómetaliga nær, tí hetta skal henda beint undan komu hansara. Hugsa tær, 500 jødar blivu frelstir eitt kvøld av einari prædiku. Ja, tað er, sum hoyrir tú fótafet Jesusar beint í túninum. Nú ræður um at brúka tíðina rætt og fara undir miðvísa bøn og biðja øll okkara kæru inn í Guds ríki.

Nú eitt sunnukvøld hoyrdu vit Thorstein Grotbæk á Visjon Norge. Hann hevur verið pastorur og bíbliulærari. **Hann greiddi frá einari hending, sum hann hevði upplivað:** Tað vóru eini hjún, sum komu í meinigheitina, tey vóru trúgvandi, men sonur teirra var ikki trúgvandi.

Tey bóðu nógv fyri honum, og serliga lá hetta tungt á mammuni. Sonurin arbeiddi á einum byggiplássi. Ein dagin ringdu tey av arbeiðsplássinum og søgdu, at ein arbeiðsvanlukka var hend. Sonur teirra var dottin 6 metrar niður úr byggipallinum og beint niður á betong.

Hann var illa skaddur, og tey væntaðu ikki, at hann fór at yvirliva.

Foreldrini kvikaðu sær at koyra yvir á sjúkrahúsið; men fyrst ringdi mamman til Thorstein og segði: „Nú mást tú hjálpa okkum. Bið um, at Gud ger eitt undur. Sonur okkara má ikki fara inn í ævinleikan ófrelstur.“

Thorstein setti seg í bilin og koyrdi yvir á sjúkrahúsið, og allan vegin bað hann Gud grípa inn. Tá ið hann kom inn á sjúkrastovuna, sótu foreldrini longu har, og sonurin lá í óviti. Thorstein legði hendurnar á drongin og bað Gud gera eitt undur, so at hann kundi blíva frelstur.

Um tað var sama kvøld ella dagin eftir, minnist eg ikki rættiliga; men brádliga læt drongurin eyguni upp, og fyrstu orðini, hann segði, vóru hesi:
„Mamma, eg eri frelstur!“

Tey gjørdust ovfarin, og mamman segði: „Nær og hvussu bleivst tú frelstur?“

„Tá ið eg datt av pallinum, rópti eg: „Jesus, frelst meg!“ Og tað gjørdi hann.“

Eftir at siga er, at sonurin reistist frá sjúkrasongini og var púra frískur. Honum bagdi einki.

So ver tú áhaldandi í bønini og bið fyri tínum kæru og fyri teimum, sum eingin biður fyri.

*Effie Campbell.*

# Móti hæddunum

*„Himmiríkið hoyrir slíkum til.“ Matt. 19,14.*

Vit skulu taka eitt lítið brot úr bókini „Det bedste venter stadig“ av Fritz Rienecker. Hetta brotið vísir skilliga, at nógv ikki er, sum vit hugsa okkum tað.

Ein hin syrgiligasta løtan fyri foreldur er, tá ið tey verða var við, at barn teirra er andaliga brekað.

Í einum heimi fyri slík børn varð Catherine matað í tjúgu ár. Gentan hevði verið djúpt evnaveik, frá tí hon kom í verðina og hevði ongantíð sagt eitt orð, tað var bara tað, at lív var í henni. Antin stardi hon still upp á veggin, ella gjørdi hon høpisleysar rørslur. At eta, drekka og sova var alt lív hennara. Tað tóktist ikki, sum hon tók lut í tí, sum fyrifórst uttan um hana.

So máttu teir taka annað beinið av henni. Starvsfólkið ynskti alt gott fyri Cathy og vónaði, at Harrin skjótt fór at taka hana heim til sín.

Ein dagin sendi læknin boð eftir fyristøðumanninum. Catherine lá at doyggja. Tá ið teir báðir komu inn á kamarið, vildu teir ikki trúgva sínum egnu sansum. Catherine lá og sang kristnar sálmar, sum vórðu brúktir til jarðarferðir. Hon sang aftur og aftur hin týska sálmin „Hvor finder sjælen sit fædreland, sin hvile?“ Hon sang í ein hálvan tíma, og andlit hennara var púra broytt, so gleið hon stillisliga inn í deyðan.

Tað hevði altso bara sæð út, sum hon ikki kundi taka við nøkrum, sum hendi rundan um hana. Frá einum medisinskum sjónarmiði er tilburðurin ein gáta. Gud hevur drigið forhangið til viks fyri at eggja foreldrum til, sum hava andliga brekað børn. Gud ger eingi mistøk. Hann, sum syrgir fyri spurvunum, er hin sami, sum sigur: „Himmiríkið hoyrir slíkum til.“

*„Martyrernes Røst“ – Effie Campbell* umsetti.

# Sannleikin

Nú á døgum halda fólk, at tað er fínari at leita eftir sannleikanum enn at finna hann.

„Ein og hvør er sælur í sínari trúgv“ hevur einki við kristindómin at gera. Harafturímóti sigur Jesus: „Eg eri vegurin, sannleikin og lívið“ og „Tann, sum ikki er við mær, er ímóti mær.“ Tað er so fittligt at vera lunkaður; men sum tú sært, er tað ikki hugsingur um, tá ið tað er um kristindómin at tala. Her ert tú annaðhvørt ísakaldur ella glóðheitur.

*Effie Campbell* umsetti.

# Normal-temperaturur

Í Nýggja Testamentinum hjá Jógvani, sum hann fekk frá Haremst, presti, tá ið hann varð fermdur, stendur: „Vælt din vej på Herren, stol på ham, så griber han ind.“

Tað munnu vera nógvir føroyingar, sum hava gist á Hotel Hebron, tá ið teir hava verið staddir í Keypmannahavn. Niðri í matarsalinum har stendur við gullbókstøvum á tí hvíta vegginum somu orð: „Vælt din vej på Herren, stol på ham, så griber han ind.“ Sal. 37,5.

Normal-temperaturin hjá einum frískum persóni, einum sum er sunnur og ferðigur og ikki hevur fepur, er 37 og 5. Tann andaligi normal-temperaturin er somuleiðis Sálm. 37,5. Her fáa vit eitt einastandandi tilboð. Vit býta orðið sundur í trý:

Velt din vej på Herren. Her fært tú tilboð um at kasta allar tínar trupulleikar, tíni ivamál og tínar stúranir yvir á hann, sum er hægsti myndugleiki í allari himnarúmdini. Hann situr enn á trónuni og hevur allar træðrir í hond síni.

Stol på ham. Ja, tú kanst líta trygt á hann, hann hevur ongantíð svikið nakran, og hann rekur ongan frá sær, sum kemur til hansara. „Eg skal als ikki sleppa tær, og á ongum sinni fara frá tær, " sigur hann í Hebr. 13,5.

Så griber han ind. Hetta er eitt veldugt lyfti frá „Kongi konga og Harri harra". Tak hetta orðið til tín, og sig tað hart hvønn tann einasta dag, so tað sum eitt frækorn kann vaksa í tær.

*Effie Campbell.*

# Til umhugsanar

Prestur vitjaði eini hjún, sum vóru kend fyri at skeldast illani. Longu meðan prestur stóð úti í túninum uttan fyri hús teirra, hoyrdi hann gangin frá teimum. Tey stóðu mitt í dagsins skeldaríi og ágangi. Hann fór inn til teirra og byrjaði revsiprædiku sína soleiðis:

Skriftin sigur, at maður og kona skulu vera eitt; men tá ið fólk koma á gátt hjá tykkum, ljóðar tað, sum vóru tit minst 10.

„*Et Ord med på Vejen*" – *e.c.* umsetti.

---

Ein bygdarkona, sum búði í Havn, lá at doyggja. Hon lá við ongum viti. Maður hennara sat við songarstokkin. Tá hoyrir hann alt í einum, at hon lesur upp eitt vers, sum hon hevði lært sum ung:

*Djevel, du begærer af mig.*
*Jeg har dig slet intet at give,*
*tag du dit og pak du dig*
*til Helvedet evigt at blive.*
*Du har forspilt dit Himmerig.*

*e.c.*

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 14** *7. juli 2024* **84. árg.**

# Tak tíggjunda-kanningina

*„Berið alla tíggjundina í goymsluhúsið …*
*og roynið meg við hesum…“ Mál. 3,10.*

Gangaram Mahes er kendur í New York sum „Stór-átarin“. Tilflytarin úr Guyana elskar at eta á dýrum matstovum, men hann eigur ongar pengar at gjalda fyri matin. Í staðin fyri at fáa tamarhald á sínum matarlysti, fer hann inn í eina fína matstovu, bíleggur tann besta rættin á matkortinum, tað fínasta vínið og tær dýrastu dessertirnar. Síðani etur og drekkur hann av hjartans lysti, og tá ið rokningin kemur, so sigur hann bara bart út við tænaran, at hann hevur ongar pengar. So kemur løgreglan og handtekur hann, og so fær hann minst tveir dagar við ókeypis máltíðum í fongslinum.

Veitst tú hvat? Okkara kirkjur eru fullar av fólki, sum drekka mjólkina av Guds vælsignilsum, eta stórar búffar av Guds blíðskapi og njóta dessertina av Guds kærleika – men tey hava ongantíð so frægt, sum givið honum 10% fyri tænastuna. Ver tú ikki ein teirra!

Tá ið tú gevur tey fyrstu 10% av inntøku tíni, fer ein guddómlig kraft í gongd. Gud signar tey 90%, ið eftir eru, og tey røkka so nógv longri, enn tíni 100% høvdu viljað rokkið uttan Hansara signing. Merkir tað, at Gud gevur tær fleiri pengar, enn tú gavst Honum? Ikki neyðturviliga, men Hann lovar tær, at Hann vil vælsigna teg meira, enn tú trúði var møguligt. Tað kann vera, at tað er við einari góðari heilsu, góðvild frá stjóra tínum, leiðslu gjøgnum lívið, ella at Gud verjir teg og tíni

kæru. Gud sigur: „Berið alla tíggjundina í goymsluhúsið, so at føðsla verður í húsi mínum, og roynið meg við hesum, sigur Harri herliðanna, um eg ikki tá latið tykkum himinsins lokur upp og ríkliga helli út signing yvir tykkum."

Ger tað bara. Tak tíggjunda-royndina.

*„… et Ord til Dagen"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Tey góðu tíðindini

*Bróðir Xu, ið hevur stovnað skipanina við húsmeinigheitunum „Føddur av nýggjum" í Kina, sigur soleiðis:*

„Nú er av sonnum tíðin komin at fremja og fullføra missiónsboðini, sum Gud gav sínum eftirfylgjarum fyri 2000 árum síðani. Um Gud bara hevði viljað frelst okkum, so hevði hann tikið okkum inn í himmal sín í teirri løtuni, vit komu til trúgv. Staðin fyri letur hann okkum óverdigu børn blíva á jørðini av eini einastu orsøk. Hann vil, at vit skulu boða tey góðu tíðindini fyri øllum heimsins fólkasløgum: At Jesus livir og er komin at seta fangar í frælsi. Latið okkum geva okkara hjarta, okkara tíð og okkara megi til hesa uppgávuna. Lat hetta vera grundina til, at vit liva."

*Effie Campbell* umsetti.

# Uppgávan

*Jesus gav okkum eina uppgávu: Vit skulu fara til øll fólkasløg og gera tey til lærusveinar. Matt. 28,19–20.*

Sjálvt um tað ber til at náa langt við sjónvarpi og sosialum miðlum, so er neyðugt at senda menniskju út millum fólkasløg og mentanir fyri at byggja upp eitt netverk, so fólk kunnu gerast lærusveinar og fáa ein felagsskap í kirkjum.

Gud sendi ikki ein teldupost, hann sendi ein boðbera, son sín. Jesus opinberaði seg fyri Paulusi á vegnum til Damaskusar, men Jesusi tørvaði ein lærusvein, sum æt Ananias at bera Paulusi frelsuboðskapin. Gud brúkar ikki einglar sum trúboðarar. Hann brúkar menniskju. Jesus gjørdist hold og blóð og tók bústað okkara millum. Hevur tú nakrantíð sæð ein vind standa stillan? So satt, sum vit eru fylt við Heilaga Andanum, eiga vit at flyta okkum framá og ikki standa still sum ein saltsúla.

*Effie Campbell* umsetti.

# Jesus grøddi meg fyri deyðiligt krabbamein

*Per Næss hevði eina sjáldsama og drepandi krabbameinssjúku (Von Recklinghouses sjúku – nevrofibromatese), sum herjar á miðnervalagið, beinagrindina og heilan.*

Fyri tíggju árum síðani small hann í gólvið á arbeiðsplássinum og varð koyrdur í skundi á sjúkrahúsið. Teir funnu 47 illkynjaðar krabbavøkstrar. „Læknin læt topplokið upp, skar og lappaði meg saman aftur. Fyrst varð eg sendur á eitt hvíldarheim og so til hús," sigur Næss.

Ikki vardi leingi, fyrr enn hann var rættiliga vánaligur aftur og varð innlagdur á Radiumsjúkrahúsið. Har fekk hann „cellukur" í tríggjar vikur, men støðan versnaði.

Per Næss varð fluttur til Lovisenberg Hospice. Tey, sum verða innløgd har, koma aloftast ongantíð livandi haðani. Tú fært umsorgan, kærleika og røkt. Tey geva tær ein virðiligan enda á lívinum.

Ein dagin komu nøkur frá Evangeliesenteret í Oslo inn á stovuna hjá Peri at biðja fyri honum.

„Eg bað eisini sjálvur. Tá eg bað, fór alt rúmið at lýsa sum ein yvirvaksin eldkúla. Í tí eina horninum sá eg Jesus standa og veittra til mín. Jesus kom yvir til mín, og eg føldi, tá ið hann legði hendurnar á meg. Allur kroppurin gjørdist glóðheitur. Jesus segði: „Per, tú skalt ikki doyggja. Tín tíð er ikki liðug. Reis teg upp úr songini og gakk."

Um hesa tíðina vigaði Per Næss bara 38 kilo. Dagin eftir fór hann út úr stovuni uttan at styðja seg til nakran.

Per Næss varð grøddur hundrað prosent frá krabbanum. Yvirlæknin á Radiumsjúkrahúsinum, Jan Vincent Johannesen, skrivaði soleiðis um undrið: „Vit skilja einki av hesum undrinum, sum er hent við Peri Næss."

Per er nú aftur í arbeiðslívinum. Hann arbeiðir 25% í einum starvi hjá samferðsluni, hjálpir til á Evangeliesentrunum og ferðast runt og heldur fyrilestrar saman við krabbameinsfelagnum.

„Eg eri glaður. Jesus hevur fullkomiliga broytt lív mítt. Lívið er eingin sjálvfylgja. Tað er ein gáva, og vit sleppa bara at læna hana. Tað er so týdningarmikið hjá mær at sleppa at siga frá

tí, sum er hent við mær. Jesus hevur staðið dygst við songina hjá mær, og eg havi sæð hann grøtt meg. Jesus er hjá mær 24 tímar í døgninum," leggur Per dent á, og so heldur hann áfram: „Minst til! Tá ið tú møtir mótgongd, halt so saman hendur og bið Faðirvár. Søk Jesus. Tað ber til at finna hann!"

*„Hjemmets Venn"* – *Effie Campbell* umsetti.

---

Leonid Bresjnev varð einaferð spurdur, hví hann ikki gav øllum jødum í Russlandi loyvi at flyta til Ísraels. Hann svaraði: „Um allir jødar fara, missir Russland sín heila." – Og tað kundi hann saktans siga. Uml. 200 jødar hava fingið nobelheiðurslønina, hóast teir bara eru uml. 0,2% av heimsins íbúgvum.

*e.c.* ums.

---

Vit liva í yvirflóð, meðan onnur liva í størsta vesaldómi. – Við okkara dýra livihátti „eta vit upp hin arma" (Hábakkuk 3,14 V.D.) Hetta orðatakið vísir, at Gud lítur at teimum, sum brúka ríkidømi upp á seg sjálvan, sum mannaátarar. Tað, sum brúkt verður til luktilsi og smyrsl, kundi veitt mongum londum heilivág.

*e.c.* ums.

---

**Tey gomlu plagdu at prenta hetta orðatakið niður í børn síni:**

*Forgæves du til kirke går*
*for der Guds ord at høre,*
*om glemsom du tilbage går,*
*vil ej derefter gøre.*

*e.c.*

---

**Á einum køksveggi í Onglandi hekk hetta skeltið:**

*Kristus er Harri í hesum heimi.*
*Hann er hin ósjónligi gesturin við borð okkara.*
*Hann er hin ósjónligi áhoyrarin til samrøður okkara.*

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74